Summartilboð til allar náttarravnar



0,- kr/mb

frá kl. 24-08 allan juli

Allan juli mánað kunnu allir privat I-net breiðbandkundar hjá okkum sverma og downloada og fyri okkara skuld ríða og rógva so langt teimum lystir ókeypis á alnetinum millum midnátt og 8 á morgni..!

Góða nátt...

I-net BREIÐBAND

Um tú ikki longu hevur I-Net Breiðband so ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

FØROYA TELE

Tilboðið er treytað av at tú hevur I-net breiðbandhald frá Føroya Tele. Tilboðið er galdandi frá 1 . juli til og við 31. juli 2004.

petur & petur • 320870


# Øssur skal byggja Mazda-hús

**Til jóla stendur eitt spildurnýtt Mazda-hús liðugt við Vegin Langa í Hoyvík**

BILAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað sigur Mazda Motor Danmark í tíðindaskrivi í sambandi við, at Bilasølan v/Øssur Johannesen í gjár tók yvir umboðið fyri Mazda í Føroyum, sum Johannus Berg hevur havt síðani 1968.

– Útnevningin av nýggja Mazda-umboðnum í Føroyum er eitt lið í eini organisatiónsbroyting, har sølan av Mazda í Føroyum verður løgd undir Mazda Skandinavien við tilvísing til danska Mazda-innflytaran, Mazda Motor Danmark, sigur Jannik Olsen frá Mazda Motor Danmark.

– Bilasølan v/Øssur Johannesen, sum frammanundan umboðar merkini VW, Audi og Seat, er farin í gongd við at byggja eitt sjálvstøðugt Mazda-hús, sum skal hýsa bilasøluni hjá Mazda í Føroyum. Nýggja Mazdahúsið skal standa liðugt til jóla, verður sagt í tíðindaskrivinum frá Mazda Motor Danmark.

Víðari verður sagt frá danska Mazda-innflytaranum, at broytingin í organisatiónini og tilnevningin av nýggjum Mazda-forhandlara í Føroyum eisini merkir, at allar garanti- og reklamatiónsumvalingar upp á Mazda-bilar frá 1. juli at rokna bara kunnu gerast hjá Bilasøluni v/ Øssur Johannesen.

– Dagførda, modernaða verkstaðið undir leiðslu av Anton Jacobsen og Jakku Guttesen fer frá byrjan at hava tveir útbúnar Mazda-serfrøðingar. Samstundis er søla, tænasta og skrokkverkstað savnað á einum stað, sigur Jannik Olsen frá Mazda Motor Danmark.



*Øssur Johannesen fer nú at byggja ein bygning, sum skal hýsa mazda-søluni, á økinum við Vegin Langa, har Bilasølan heldur til. Bygningurin skal standa liðugur til jóla*
*Mynd: Jens Kristian Vang*


KPMG

KPMG søkir kt-fólk, grannskoðara og skrivstovunæming

**KT-grannskoðari**
Arbeiðið fevnir um kt-grannskoðan og veitan av ráðgeving á kt-økinum til kundar okkara.
Neyðugt er við royndum og ástøðiligari útbúgving innan kt-økið og/ella roknskaparøkið, helst bæði.
Neyðugt er eisini við áhuga fyri víðari lesnaði.

**Grannskoðari**
Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar.
Neyðugt er við royndum innan bókhalds- og roknskaparøkið og at hava staðið í minsta lagi HH prógv.

**Skrivstovunæmingur**
Arbeiðið og útbúgvingin fer fram eftir galdandi reglum.

**Umsøkjararnir**
Tað er eitt krav, at umsøkjararnir, umframt oman fyri nevndu royndir og útbúgving, eru fryntligir og fyrikomandi og hava lætt við at samstarva við onnur.
Kt-grannskoðarin og grannskoðarin skulu vera til reiðar at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð, um tørvur er á tí. Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

**Umsóknirnar**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 15. juli 2004.
Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Árna Ellefsen, statsaut. revisor.

**KPMG statsaut. revisorar Sp/f**
kpmg@kpmg.fo • www.kpmg.fo

Tórshavn
Staravegur 17 · Postboks 3258
Telefon 34 34 34 · Telefax 34 34 35

Saltangará
Heiðavegur 15 · Postboks 190
Telefon 34 34 54 · Telefax 474 475

www.sansir.fo · ©KPMG, føroyska limafelagið í altjóða KPMG, ið er sveisiskur felagsskapur. Endurprenting bannað.




# Út í heim at hitta javnaldrar

**Elsti bilur í Føroyum, 89 ára gamli Ford T bilurin hjá Hans Elmar Poulsen á Vatnsoyrum, fór fríggjamorgunin til Danmarkar við Norrönu, har hann skal hitta javnaldrar**

FERÐING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Vit verða eini 12-13 gamlir Ford T bilar, sum hittast til Ford T treff nærindis Thisted í Norðurjútlandi næsta vikuskifti, sigur Hans Elmar Poulsen, sum eigur elsta bilin í landinum, ein Ford T frá 1915.

Hans Elmar Poulsen hevur stóran áhuga fyri gomlum bilum, og hann fann hendan bilin í Danmark, tá hann fyri 12 árum síðani leitaði eftir einum Ford T lastvogni, sama slag sum fyrsti bilurin, ið kom til Føroya í 1922. Seinni fann hann lastvognin, ið er júst sama slag bilur, sum tann, ið Johannes Olsen og Júst Sivertsen fingu til Føroya 6. mai í 1922.



*Hans Elmar Poulsen í bíðirøðini til Norrönu í gjáramorgunin í gamla Ford T bilinum, sum verður 90 ára gamal í november næsta ár*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*


Leiga ein bil



Kunning og bilegging á tel. 31 35 35 ella á www.avis.fo

· Persónbilar í øllum støddum
· Vøruvognar
· 4x4 Pickup
· Minibussar til upp til 9 fólk
· Langtíðarleiga
· Tímaleiga
· Leiga uttanlanda

Johs. Berg
Staravegur 1-3
FO-100 Tórshavn
Tel.: +298 31 35 35
Mobil.: +298 21 75 35
Fax: +298 31 77 35
E-mail: avis@avis.fo

AVIS We try harder.

www.avis.fo

team85 tel 358000





Gott føroyskt borð
- í Glasstovuni hvørt mánakvøld

Hvørt mánakvøld í summar kl. 18.00 - 22.00 er "Føroyskt Borð" í Glasstovuni á Hotel Føroyum.

Á borðinum er m.a.: skinsakjøt, skerpikjøt, turrur fiskur, grind og spik, seyðarhøvd, ræst kjøt, fiskur, rækjur, laksur, øða og jákupskeljar.

Prísur **kr. 215,-** fyri hvønn.

Ringið til okkara á tel 31 75 00 og bíleggið borð.

Vit skapað góð minni...

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant
Tel 31 75 00

petur & petur • 320870



TELETÍÐ ONLINE



MEIRA FYRI HVØRJA KRÓNU
Keyp talutíð á www.tele.fo

110,- fyri kr. 100,-
225,- fyri kr. 200,-

+298 808080 www.tele.fo

FØROYA TELE

team85 358000